skagen strand

væk fra det hele, tæt på det meste









......sommer på Skagen Strand!

Hvad med at nyde sommeren på toppen af Danmark, og bo i en dejlig feriebolig på Skagen Strand? Vi har de fleste solskinstimer i Danmark, og Skagen er altid en sand fornøjelse. Vi ligger tæt på en af Danmarks bedste badestrande, og er du ikke til hav, så har vi et dejligt badeland - med fri entré naturligvis! Priseksempel. Ankomst fredag 26/6 i feriebolig med plads op til 5 personer.

Ugeophold fra Kr. 6.450,-

tranevej 108 hulsig dk - 9990 skagen t: +45 9848 7222 f: +45 9848 7115 skagenstrand.dk

# Har kóparnir vera fóðraðir



**Eitt hitt besta staðið hjá børnum at nema sær kunnleika um havið, og tað sum livir í sjónum er »Fiskeri og Søfartsmuseet« í Esbjerg**

Fyri tey sum ynska, at ein familjuferia í Danmark ikki bara skal vera summar og sól, gaman, spæl og stuttleiki, men eisini eitt uppihald, har tey yngstu veruliga kunnu læra nakað, so er sjósavnið í Esbjerg – »Fiskeri og Søfartsmuseet« avgjørt neyðugt at seta á skránna í sambandi við Danmarkartúrin.

## Opið alt árið

Við strondina, nakað norðan fyri fiskivinnuhavnina í Esbjerg, býðst høvi at vitja »Fiskeri og Søfartsmuseet«. Savnið er umgyrt av skógi, strond og havi, og so liggja nógvar upplivingar og bíða – bæði í og uttan fyri savnið. Sjósavnið í Esbjerg er opið alt árið. Tað er bara stongt jólaaftan, fyrsta jóladag, nýggjársaftan og nýggjársdag. Upp- og afturlatingartíðirnar eru millum klokkan 10 og 17. Í hægstu feriutíð – í juli og august – er tó opið millum klokkan 10 og 18. Skulu børnini hava ta serligu



upplivingina at vera hjástødd, tá kóparnir vera fóðraðir, so er neyðugt at vera upp á pláss í sjósavninum klokkan 11, og klokkan 14.30.

## Ymiskar deildir

Fyri at gera upplivingina – og frálæruna – betur skipaða, so hevur sjósavnið í Esbjerg ymiskar framsýningar á ymiskum økjum kring bygningin. Millum serstøku deildirnar er t. d. Sælarium, har kóparnir halda til. Eitt stórt akvarium er eisini ein sjálvsagdur partur av sjósavninum, og har ber til at síggja alskyns fiskasløg og skeljadjór.

Sjósavnið gloymir heldur ikki sterku røturnar hjá Esbjergar býi í fiskivinnuni. Sjósavnið í Esbjerg er eisini eitt landsdekkandi sersavn fyri donsku fiskivinnuna, og fevnir tað eisini um søguligar fiskivinnugreinir, líka frá sildarokinum í miðøldini í Oyrasundi til royndirnar at hava eina burðardygga veiðu í Norðsjónum. Tann støðuga fiskivinnuframsýningin lýsir danska fiskiskapin, við serligum denti á tíðarskeiðið 1880-1940, har menningin gekk frá stórum jollum til útróðrarbátar, sum royndu á opnum havi. Til ber at síggja skipa- og bátamodel, reiðskap, før og umhvørvi, sum lýsa korini hjá danskari fiskivinnu.

## Ribe, Fanø og Esbjerg

Ein onnur framsýning er á sjósavninum, sum nevnist »Vadehav og Verdenshav«. Framsýningin lýsir sjósøguna frá víkingaøld til dagin í dag. Høvuðsevnini eru sjósøgan hjá Ribe, Fanø og Esbjerg. Í víkingaøldini og í miðøldini var Ribe ein hin týdningarmesti havnin í Danmark, men umfarssjúkur, kríggj við Svøríki, og at einaveldiskongarnir bara satsaðu upp á Keypmannahavn, gjørdi at Ribe misti hesa støðu.

Í 18. og 19. øld áttu Fanø ein hin størsta seglskipsflotan í Danmark. Næstan øll á Fanø livdu av sjóvinnuni, og tóku fleiri lut í langfararasiglingini.

Havnin í Esbjerg var gjørd í 19. øld sum ein viðbót fyri tær havnirnar, sum Danmark misti í krígnum ímóti Preusia í 1864. Nógv gott og spennandi fæst at vita á Fiskeri og Søfartsmuseet.

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*